P/F 14-02-2006
Postrúm 85
530 Fuglafjørður

Tórshavn, hin 28. februar 2007
Málnr.: 61002-200600010-10
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

**Umhvørvisdeildin**

# Umhvørvisgóðkenning
av
# Oljugoymslu í Fuglafirði

Henda umhvørvisgóðkenning av oljugoymslu hjá P/F 14-02-2006 á Enninum í Fuglafirði, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur fingið umsókn frá SpF MP. Tek um umhvørvisgóðkenning av oljugoymslu til fuelolju og gassolju og bunkringarskipan í Fuglafirði, dagfesta 31-12-2005. Saman við umsóknini og í seinni skrivum frá SpF MP. Tek hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan fingið tekningar, lýsing av ætlaða virkseminum o.a.

Móttikna tilfarið hevur verið grundarlag undir viðgerðini.

## 3. Lýsing av virkinum og umhvørvisviðurskiftum

Virkið er á Enninum í Fuglafirði

Ætlaða virksemið er hetta:

- At veita skipum brenniolju í tí tjúkd, sum tey ynskja. Fuelolja og gassolja verða blandað í tí lutfalli, sum kundin ynskir. Blandað verður undir sjálvari bunkringini í einum teldustýrdum blandiverki.
- At veita fuelolju til Havsbrún gjøgnum oljuleiðing frá oljugoymsluni til Havsbrún.
- At koyra olju út til kundar við tangabili, sum verða fyltir á lessirampu á plássinum.

Ætlanin er at hava IFO 380 fuelolju og gassolju á goymslu.

Á virkinum verða hesir tangar:
Ein 5.000 m³ dieseltangi, D x H = 20 x 16 m,
Tveir 7.100 m³ bjálvaðir fueltangar við hitaslangum, D x H = 23,8 x 16 m.

Rørleiðing verður gjørd frá goymsluni til fueloljutangarnar hjá Havsbrún.

Tangarnir standa í 0,6 m høgum tangagarði við tøttum botni, ið rúmar íalt uml. 780 m³.

Alt vatn úr tangagarði og uttandura økjum, har olja kann vera, verður leitt í oljuskiljara við koalisensfiltri, sjálvvirkandi læsing og alarmskipan áðrenn tað fer í kloakkina.

Á tangunum er peili- og hitamáting, sum verður skrásett á teldu. Eisini eru alarmar, sum siga frá um olja minkar úr tangunum tá einki virksemi er.

## 4. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum. Harumframt eru **góðkenningartreytirnar í fylgiskjali 1** galdandi.

Um ósamsvar er millum treytirnar niðanfyri og treytirnar í fylgiskjali 1, eru treytirnar **niðanfyri galdandi**.

Um ósamsvar er millum treytirnar í hesi góðkenning og verandi ella komandi ásetingar í lóggávu, t.e. lóg ella kunngerð, eru ásetingarnar í lóggávuni galdandi.

### 4.1 Oljugoymsla

4.1.1. Allir oljutangar skulu hava tangagarð, so at lekar og spill kunnu haldast aftur. Tangagarðurin skal vera tættur.

4.1.2. Ventilur til tøming av regnvatni úr tangagarði skal altíð vera stongdur. Tømast má bara úr tangagarði undir eftirliti.

4.1.3. Alt yvirflatuvatn, sum kann innihalda olju, skal í reinsiskipan, so sum oljuskiljara við koalisensfiltri, sjálvvirkandi læsing og alarmi.

4.1.4. Allar rørleiðingar skulu verða gjørdar soleiðis, at møguligir lekar verða hildnir aftur.

4.1.5. Regluligt eftirlit skal vera við oljutangum, oljurørleiðingum, uppsamlingarbrunnum og kanalum.

4.1.6. Í minsta lagi triðja hvørt ár skal kannast um oljutangar og rørleiðingar, brunnar, oljuskiljarar o.a. eru tøtt og í góðum standi. Kanningin skal gerast av óheftum persóni ella felag, sum er góðkent til slíkt eftirlit. Gerast skal eftirlitsfrágreiðing.

### 4.2 Mannagongdir fyri innskipan og avskipan

4.2.1. Greiðar mannagongdir skulu vera fyri innskipan og avskipan, sum m.a. innihalda ábyrgdarbýti, útgerð, eftirlitslistar og annað av týdningi.

4.2.2. Ábyrgdarpersónar fyri innskipan / avskipan skulu vera bæði hjá móttakara og veitara meðan innskipað / avskipað verður. Hesir skulu, umvegis hóskandi samskiftisútgerð, kunna samskifta beinleiðis meðan innskipað / avskipað verður.

4.2.3. Fyri hvønn einstakan tanga, sum olja skal fyllast á, skal innihaldið vera mált áðrenn innskipan / avskipan byrjar, og gerast skal greitt, hvussu nógv olja skal fyllast á.

4.2.4. Áðrenn innskipan / avskipan byrjar skal kannast um øll rør og slangur eru trygg, og at allir ventilar eru í rættari støðu.

4.2.5. Áðrenn bunkring byrjar, skal tryggjast, at møguligt yvirflot úr tangum umborð á skipi verður hildið aftur.

4.2.6. Øll op á skipi, haðani møguligt yvirflot av olju kann renna á sjógv, skulu verða lokað og tøtt áðrenn bunkring byrjar.

4.2.7. Tá bunkringin er liðug, skal tryggjast at møguligar leivdir av olju í slangum og rørskipanum verða hildin aftur fyri at sleppast skal undan at olja kemur á dekkið, á jørðina ella á sjógv.

4.2.8. Hóskandi útgerð at fyribyrgja, avmarka og basa dálking skal vera á staðnum tá innskipað / avskipað verður, t.d. tilfar, ið sígur olju í seg.

4.2.9. Gerast skal tilbúgvingarætlan, sum inniheldur ábyrgdarbýti og mannagongdir fyri, hvat gerast skal um olja flýtur yvir, bæði umborð á skipi, á landi ella á sjógv. Tilbúgvingarætlanin skal harafturat hava útgreining av tí útgerð og manning, sum er tøk á staðnum ella kann fáast til vega, og hvussu skjótt henda útgerð og manning kann vera á staðnum.

4.2.10. Avrit av mannagongdum og tilbúgvingarætlan skulu sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

4.2.11. Áðrenn bunkring byrjar, skal boðast frá til havnarmyndugleikan og møguligar veitarar av útgerð at nýta í sambandi við óhapp. Eisini skal boðast frá tá bunkringin er liðug.

4.2.12. Skip, ið innskipað verður frá ella sum bunkra, skulu liggja trygt við bryggju.

4.2.13. Ljósviðurskiftini á bryggjuni, umborð og kring skipið skulu vera so góð, at tað týðiliga sæst, um olja fer at leka.

4.2.14. Oljuveitingin skal støðgast beinan vegin um tekin eru um, at innskipan / avskipan ikki fer fram trygt, forsvarliga og sambært avtalaðum mannagongdum, t.d. um radiosamband millum veitara og móttakara gerst óvirkið, tekin eru um yvirrenning ella skaða á útgerð, ella veitarin varnast, at móttakarin ikki er á røttum stað.

4.2.15. Virkið skal hava hóskandi umhvørvisstýriskipan, sum inniheldur mál og mannagongdir fyri stýring av virksemi, dálkingaravmarkandi tiltøk, viðlíkahald, orkunýtslu, skráseting, handfaring av burturkasti ábyrgdarbýti o.a.
Í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at virkið er farið í gongd, skal uppskot til umhvørvisstýriskipan sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

4.2.16. Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingunum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, innaneftirlit, tulking av møguligum kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a. skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum..

## 5. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

______________________________
Bárður Enni, stjóri

/

______________________________
Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Fuglafjarðar kommuna, Postrúm 10, 530 Fuglafjørður
Landslæknin, Postrúm 9, 110 Tórshavn.
Sp/f MP. Tek, Láarvegur 13, 100 Tórshavn

**Hjálagt:** Fylgiskjal 1.

**Fylgiskjal 1**

## Góðkennningartreytir

### 1 Innrætting og rakstur

1.1 Virkið skal rekast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

1.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

1.3 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.

1.4 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.

1.5 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

### 2 Goymslur

2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

### 3 Óljóð, ristingar og ljós

3.1 Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1:** Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

3.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

3.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

### 4 Útleiðing til luft

4.1 Virksemi má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

---

[1] Best Available Techniques.

[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

4.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 5 Spillivatn

5.1 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina

5.2 Eru dálkandi evni í spillivatninum, skal ein hóskandi reinsiskipan nýtast, so sum olju- ella feittskiljari.

5.3 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar.

5.4 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum.

5.5 Spillvatnið skal yvirhalda markvirðini í talvu 2.

**Talva 2:** Markvirði fyri spillivatn

| Evni | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l | DS/R 208 |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l | DS/R 208 |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l | DS 233 |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l | DS 207 |
| pH | 6 - 9 | |

## 6 Burturkast

6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].

6.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.

6.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## 7 Óhapp

7.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

7.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

7.3 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

7.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

7.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni[4].

## 8 Innaneftirlit

8.1 Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

8.2 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar í 3. parti, um óljóð, ristingar og ljós, í 4. parti, um útleiðing til luft, og í 5. parti, um spillivatn, verða hildnar.

---

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

8.3 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

8.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

## 9 Rakstrarskráseting

9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av rávørum og kemikalium. Databløð fyri øll kemikaliu skulu verða tøk.
- El- og oljunýtsla.
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.

9.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 9.1

## 10 Almennar treytir

10.1 Boðast skal Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

10.2 Gongur meiri enn eitt ár, áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

10.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

10.4 Góðkenningin skal altíð vera tøk á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

10.5 Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

10.6 Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

10.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

10.8 Aftan á fimm ár kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

10.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum